# Føroyar eitt valdømi. Hvat er demokratiskt?

VIÐMERKING
*Jógvan Sundstein*

Aftan á at landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur slept ætlanini um broytingar í vallógini, trínur løgtingsformaðurin fram og vil koma við einum uppskoti um at gera Føroyar til eitt valdømi. Beinanvegin hevur Sjónvarp Føroya talt tingmannaatkvøður upp og staðfestir, at nú er meiriluti fyri einum slíkum uppskoti.

Kringvarpið loypur á leistum, løgtingsformaðurin og nakrir tingmenn gera tað sama. Nú skal skipanin "moderniserast". Nú skulu eingir útrokningartrupulleikar vera longur. So og so mangir flokkar stilla eitt ávíst tal av valevnum upp hvør. Atkvøtt verður millum somu listar um alt landið, og lutfalsliga verður so roknað út, hvussu mangar sessir hvør flokkur hevur fingið. Lætt og skjótt.

Og argumentini eru enntá, at hetta er rættvíst og demokratiskt. Onkur síðuvinningur er eisini afturat so sum, at nú ber til at fáa fleiri kvinnur valdar. Einki stríð við at halda uppstillingarfundir í - nú fyrrverandi - valdømisfeløgunum. Einki stríð við at útvega stillarar í sjey ymiskum valdømum. Nei nú verður alt skipað av eini miðleiðslu fyri hvønn flokk. Fyrstu ferð sleppa valdømisfeløgini kanska at spæla við. Men sum frá líður verður alt miðsavnað.

Og hvat skulu vit hava alt hatta fjasið við valdømum til. Oddagreinin í Dimmu gevur svarið: Rationaliserið skipanina, Føroyar telja ikki fleiri íbúgvar enn ein danskur provinsbýur. So tað er bara at einsrætta alt samalt. Nú havi eg fingið eitt sindur av kunnleika til ein danskan provinsbý, sum er lagdur saman við fýra øðrum umliggjandi kommunum til eina størri kommunu við umleið 60.000 íbúgvum. Men tað er ikki bara sum at siga tað. Trupulleikarnir eru margfaldir, og demokratiið



*Jógvan Sundstein var løgtingsmaður frá 1970-94. Hann var løgmaður frá 1989-1991 og landsstýrismaður í fíggjarmálum frá 1991-94*

virkar als ikki, burtursæð frá, at flokkarnir hava mandatir í býráðnum samsvarandi lutfallinum av atkvøðum. Summar av fyrrverandi smærri kommununum hava fingið okkurt umboð valt í nýggja býráðið, aðrar ikki. Ónøgdin er stór í summum førum, aðrastaðni er tað líkasælan,sum ræður.

Málið er bara ikki so einfalt, at vit kunnu sláa alt saman í eina pulju. Eg fari at loyva mær at sitera burtur úr uppskotinum til Stjórnarskipan Føroya:

*"Vit bygdu hetta landið í fornari tíð og skipaðu okkum við tingi, lógum og rættindum. Vit hava hildið ting til henda dag og skipað okkum eftir fólksins tørvi um landið alt."*

*(Brot úr formælinum).*

Frá fornari tíð komu menn saman úr øllum landinum til tings í Tórshavn. Dentur var lagdur á, at teir komu allastaðni frá. Sum frá leið, tá vit fingu beinleiðis val av tingmonnum, varð landið býtt upp í valdømi. Týdningarmikið var, at allir partar av landinum vóru umboðaðir og kundu føra fram síni sjónarmið. Seinni fingu vit politiskar flokkar, og hesir komu at standa fyri uppstillingunum til løgtingsvalini. Tingmenn komu tí at umboða bæði flokkspolitisk sjónarmið og vera talsmenn fyri tað valdømi, tað vil siga tann part av landinum, teir umboðaðu. Tað ræður tí um at halda fast við tað prinsipiella í hesi dupultumboðan.

Funnist hevur verið at, at núverandi valdømisskipan hevur havt við sær, at flokkarnir ikki altíð hava fingið "rætta" tingmannatal sambært lutfallinum av samlaða atkvøðutalinum. Dømi um hetta er í løtuni, at Sambandsflokkurin hevur ein mann ov lítið og Tjóðveldisflokkurin ein mann ov nógv í tinginum. Men hesin vansin kann rættast uttan at kollvelta skipanina, soleiðis sum greitt verður frá seinni.

Ført hevur verið fram, at tað er ódemokratiskt t. d. at Suðurstreymoy lutfallsliga hevur færri umdømisvaldar enn enn t. d. Sandoyggin ella Suðuroyggin. Men hetta er ein stór misskilj-ing. Demokratiið er ikki ein spurningur um matematiska útjavning, men fyrst og fremst ein spurningur um, at øll sjónarmið innan rímuligt mark kunnu sleppa framat. Tí eigur Suðurstreymoy t. d. ikki at hava rætt til 20 ferðir so nógva umboðan á tingi sum Sandoyggin. Demokratiski rætturin krevur, at hvørt av hesum valdømum er tryggjað umboðan við so nógvum røddum, at tær kunnu hoyrast. Eitt rímuligt tal í hesum døminum vildi tí verið, at Sandoyggin fekk tryggjað 2 og Suðurstreymoy 6 valdømisvald umboð. Tað størra fólkatalið í Suðurstreymoy vil hava við sær, at fleiri útjavningarumboð koma í hesum valdøminum.

Mín heilt klára sannføring er, at tað ikki er rætt at gera alt alt landið til eitt valdømi. Vandi vil tá vera fyri, at summir lokalpolitikkarar ikki vera valdir, og saknur verður í teimum. Hetta vil hindra eini javnari og skilagóðari útbygging av øllum landinum. Og vit hava brúk fyri øllum landinum. Tað er ikki størri enn so.

Í staðin fyri eitt valdømi, eigur vallógin at vera broytt til, at samanlagt kunnu veljast 33 tingmenn (sum stýrisskipanarlógin loyvir) í teim sjey valdømunum. Hetta hevði longu givið ein eykavaldan afturat teim 5, sum eru í løtuni. Men um talið í teim báðum fólkaríkastu valdømunum samstundis varð lækkað, kundi útjavningarmandatini verið hækkað til 8 ella 9. Býtið kundi sostatt veri hetta:

| | |
|---|---|
| Norðoya valdømi | 4 valdømisvaldar |
| Eysturoya valdømi | 4 valdømisvaldar |
| Norðstreymoyar valdømi | 2 valdømisvaldar |
| Vága valdømi | 2 valdømisvaldar |
| Suðurstreymoyar valdømi | 6 valdømisvaldar |
| Sandoyar valdømi | 2 valdømisvaldar |
| Suðuroyar valdømi | 4 valdømisvaldar |
| Tilsamans | 24 valdømisvaldar |
| Harafturat koma upp til | 9 eykavaldir |
| **Hetta gevur tilsamans** | **33 tingmenn** |

Hendan skipanin tryggjar øllum valdømum umboðan, eisini teimum við lítlum fólkatali. Hinvegin vilja tey stóru valdømini, sum lutfallsliga fáa færri valdømisvaldar, fáa teir flestu av teim eykavaldu. Samstundis gevur hetta eitt lutfallsliga rættari býti millum politisku flokkarnar. Hendan skipanin tryggjar sostatt bæði ta politisk/ideologisku umboðanina og gevur lokalu áhugamálunum rættiligs góðar umstøður.

Møguliga eiga smávegis broytingar at vera gjørdar viðvíkjandi valdømunum. Nærliggjandi er, at øll Sunda kommuna verður løgd afturat einum Norðstreymoyar/Sundalags valdømi. Um Eiðis kommuna eisini varð løgd afturat hesum valdømi, skuldi hetta valdømi kanska havt 3 mandatir. Síðani vera 8 útjavningarmandatir. Harafturímóti er einki, sum talar fyri, at Kollafjørður verður flutt til Suðurstreymoyar valdømi. Tvørturímóti er tað helst skilabetri, at Kollafjørður "slítur" við Tórshavnar kommunu og leggur saman við Sunda kommunu.

Eitt sjónarmið, sum eisini hevur verið frammi, er, at summar atkvøður telja meiri enn aðrar. Hetta virkar heilt óskiljandi. Um nóg nógv útjavningarmandat eru koma allir tingsessir at kosta nøkulunda tað sama í atkvøðum.

Niðurstøða mín er tí tann, at um tingmannasamansetingin skal vera demokratisk, skulu allir partar av landinum tryggjast umboðan eins væl og flokkarnir fáa umboðan eftir síni atkvøðustyrki. Sleppið tí ætlanunum um eitt valdømi, har alt fer í stóra pott.

PS. Annars hevði eg í august 2005 eina grein um nøkulunda hetta sama evni. Greinin hevði heitið: "Lokalpolitikkur – valdømir". Um onkur hevur áhuga fyri henni, kann hon væl finnast aftur.

# Flagstengurnar vóru líka langar!

ROLF GUTTESEN



29.4.07

**Tað ljóðar, sum Sosialurin hevur havt ein heilan tíðindamann í Bruxelles at eygleiða og rapportera tað nýggjasta frá framsýningini "European Seafood Exposition." Har samlast virkir, sum framleiða fiskavørur og vísa tað nýggjasta fram. Tíðindamaðurin hjá Sosialinum var so grammur at fáa nýggjheitirnar fram, at tað mest umráðandi bleiv lagt út á Portalin, longu leygardagin 28. apríl kl 13.23.**

Yvirskriftin var "*Kinesarar og russar áhuga fyri føroyskum fiski*". Hetta var jú ein góð yvirskrift, sum boðaði frá spennandi tíðindum. Men í greinini, sum fylgdi, stóð ikki eitt orð meira um, hvat ið russarar og kinesarar høvdu havt áhuga fyri. Teir blivu als ikki nevndir aftur. Tað átti man at kunna vænta, haldi eg. Men nei, hatta var ein tóm yvirskrift.

**Ikki um fiskaproduktir, men flaggfokusering**

Men annars hevur tíðindaberin verið vakin Tó eru tað ikki skøturavar, king prawns ella salmon tartare, sum hava áhuga. Nei, hann slær fast at: "*Føroyska merkið hevur eina serstøðu á fiskivinnuframsýningini í Brússel"* (Brússel, við einum serføroyskum tvíljóði –ú-, er helst koduorð fyri Bruxelles). Men aftur, hvat ið serstøðan ber í sær, fáa vit einki at vita um. Man kundi gitt, at ein serstøða hevði verið, um øll fløggini uttan fyri høllina í "Parc de Exposition" vóru føroysk. Men nei, tað var heldur ikki soleiðisnar meint.

**Flaggstengurnar vóru líka høgar, halleluja!**

Vit fáa at vita at "Merkið" var líka stórt sum "Dannebrog". Men er tað ein serstøða? Nei, stórtíðindini tykjast at vera, at allar flaggstengurnar uttan fyri framsýningina í Bruxelles "*vóru líka høgar.*" Fantastiskt. Gott at eygamálið var kalibrerað og í lagið, so at hesi stórtíðindir kundu berast í bý. Flaggstengurnar á eini seafood-framsýning vóru líka høgar.

Tá tað er noterað og sent við ýlandi ferð til redaktiónina, sýnist sum at alt, sum var innandura hevði minni ella ongan áhuga. Nú var æran reddað, so til tramans við laksi, goggum, sauce og skeljum. Líkamikið er, hvør ið hevði vunnið heiðursmerkir fyri nýggjar og spennandi vørur. Nei, vit fáa einaferð enn at vita, at *"Merkið her er viðurkent og virt av vertunum."*

**Føroyingar vunnu einki**

Annars fór nógv spennandi fram hesar tríggjar dagarnar í Bruxelles. 38 produktir vóru komin í finaluna til at vinna **"Prix d'Elite"**, sum verður givin í sjey ymiskum bólkum(legg til merkis, at teir ikki tosa um lond ella tjóðir her, tað snýr ser um fiskavørurnar) . Fýra finalistar vóru úr Denmark, sum heimasíðan sigur frá. Tvey av hesum produktum vóru frá Royal Greenland, trummerum tjum uhadada. Hava teir ikki virðing fyri, at Royal Greenland er úr Grønlandi? Var grønlendska flaggið ikki vundið á stong, ið var líka høg sum tann føroyska?

**Sást tú Baskaraflaggið, ella blivu teir diskrimineraðir?**

Vinnari av "Seafood Prix d'Elite" í bólkinum "Best New Retail Product" bleiv virkið Angulas Anguinaga úr Spania. Teir halda til í einum býi sum eitur Irura. Hesin býur liggur í Baskaralandinum. Teir í Baskaralandinum hava sítt egna regionala flagg, tí regiónirnar í Spania hava sjálvstýri. Hevði tíðindamaðurin hjá Sosialinum ikki eyga fyri, um baskaraflaggið veitraði har, "*viðurkent og virt av vertunum."* Um tað ikki var har, og tað grønlendska heldur ikki, hava vertirnir so gjørt ein grimman mismun? Ella hvat?

**Elitumerki?**

Stutt og gott, føroyskir framleiðarar komu aftur ongul í reyv. Teir vóru hvørki skotnir upp ella enn minni vunnu teir nakað elitumerki. Frægari eydnu næstu ferð.

Men tíðindamaðurin hjá Sosialinum sá greitt, at flaggstongin við føroyska merkinum var minst líka so høg sum hinar. So hatta man hava verið ein frammúr framsýning.